

*Íslendski kórleiðarin, Garðar Cortes, skal standa fyri framførsluni av Elias hjá Mendelssohn í Carnegie Hall*
*Mynd: Maria Olsen*

## Havnarkórið syngja í Carnegie Hall

Havnarkórið hevur óiva fingið sína størstu avbjóðing nakrantíð. Í heyst er kórið bjóðað til New York at framføra Elias hjá Felix Mendelssohn í glæsiligu og víðagitnu konserthøllini, Carnegie Hall

– Ikki kann sigast annað, enn at hetta veruliga er ein álitisváttan og óiva størsta altjóða tiltakið hjá kórinum nakrantíð, sigur kórið í tíðindaskrivi.

Kórleiðarin, íslendingurin Gardar Cortes, hevur saman við Havnarkórinum, operakórinum í Íslandi og kórum úr eitt nú Noregi, Danmørk og Svøríki, fingið hin stóra heiðurin at framføra hetta megnarvekið.

Gardar Cortes er komin at venja kórið í vikuskiftinum og fer avstað aftur mánadagin.

## Stovna ættleiðingarfelag

Føroyskt ættleiðingarfelag verður nú stovnað. Seinastu árini er tað blivið alsamt meiri vanligt, at føroyingar velja at ættleiða børn úr útlondum. Fyri bæði foreldur og børn byrjar ein nýggj tilvera saman, sum í onkrum lutum brýtur frá tí hjá »vanligum« føroyskum familjum.

Ættleiddu børnini koma frá ymiskum londum og eru ymisk til aldurs, tá tey koma til Føroya og hvørt einstakt hevur sína bakgrund og viðføri frá lívinum, áðrenn tey blivu ættleidd - hetta kann vera meiri og minni kent.

Leygardagin 3. apríl frá kl. 9 til umleið kl. 17 verður fjølbroytt tiltak fyri bæði børn og vaksin í leguhúsunum í Nesvík. Málbólkurin eru familjur við ættleiddum børnum, ættleidd ella tey, ið ætla at ættleiða. Umframt at hava stovnandi fund av føroyskum ættleiðingarfelag, verður hetta eisini ein hugnadagur við ymiskum á skránni, og ein góður møguleiki at tosa saman. Okkurt verður fyri børnini - spøl, sangur o. a. Fyri tey vaksnu verður umframt fundin viðkomandi fyrilestur v. m.

Ætlanin er, at felagið á fjølbroyttan hátt skal verða við til at samskipa felags áhugamál hjá limunum. Tað kann verða við hugnaløtum, fyrilestrum, upplýsing um ættleiðing, netverki, umboðan mótvegis myndugleikum o.s.fr.

Tað er ein mammubólkur í Havn, sum hevur tikið stig til tiltakið. Fyrsta stigið varð tikið í mai mánaði í fjør, tá ein fyrireikandi fundur varð hildin í Kommunuskúlanum í Havn. Á hesum fundinum varð ein fyrireikingarbólkur mannaður, og hava tey arbeitt við ymiskum ætlanum viðvíkjandi stovnanini av felagnum - hesum fara tey at greiða nærri frá hendan dagin.

Fyrireikarnir vóna, at nógv fara at vísa tiltakinum áhuga og at eitt føroyskt felag fyri ættleiðing fær eina góða byrjan.

Tilmelding og møguligir spurningar hjá Anniku tlf. 310649 ella Nitu tlf. 312705. Freistin at tekna seg er sunnudagin 21. mars. Vaksin 200 kr., børn ókeypis.

Morgunmatur, døgurði og millummál er við í luttøkugjaldinum.

## Tórshavnar Manskór í Húsavík



*Myndin er frá 1994, tá Tórshavnar Manskór var í Wales. 3. rað: Johan R. Jacobsen, Árni Hansen, Suni Rasmussen, Kristian Kruse, Ole Jensen, Finnbjørn Dam, Trúgvi Hansen, Ólavur Dalsgarð, Jákup Dahl-Olsen, Kristjan Dahl, Kári Hansen, Torkil Skála, Birgir Krossteig, Hanus Joensen, Petur Nielsen, Úlvur við Høgadalsá. 2. rað: Georg Egholm, Stein Fossá, Bogi Mouritsen, Kenneth Samuelsen, Jón Kragesteen, Janus Trúgvason, Anker Mortensen, Áki Davidsen, Kári av Reyni, Árni av Reyni, Jákup Lamhauge, Egon Hansen, Bogi Hansen, Heðin Johannesen, Andrias Reinert, Hugo Samuelsen. 1. rað: Martin Petersen, Chr. Reinert Petersen, Herbert Samuelsen, Kjartan Mohr, Jørgen P. Johannesen, Árni Nicolaisen, Heri Kragesteen, Bjarni Restorff, Magnus Hansen, Henry Fjallstein, Viggo A. Hansen, Karl Martin Samuelsen, Hans Pauli Joensen, Ole Nielsen, Kári Mouritsen, Thorleif Samuelsen.*

Sunnudagin 21. mars kl. 17 fer Tórshavnar Manskór at hava konsert í kirkjuni í Húsavík.

Umframt at kórið hevur verið á nógvum uttanlandsferðum, hevur kórið eisini havt konsertir fleiri staðni í Føroyum. Næstseinasta leygardag hevði kórið konsert í Nólsoy, og sigast má at bygdarfólkið vísti kórinum stóran áhuga – eini 80 fólk vóru og lurtaðu.

Hetta verður so fyrstu ferð at Tórshavnar Manskór syngur á Sandoynni.

Sangskráin er fjølbroytt.

Umframt føroyskar sangir, fer kórið at syngja sangir úr Íslandi, Danmark, Bretlandi, Ruslandi og Georgia.

## Guitarbólkur vísur kynstur á matiné í Havnar Kirkju



*Guitarbólkinum hjá Tórshavna Musikkskúla fer at vísa síni kynstur á matiné í Havnar Kirkju leygarmorgunin*

Komandi leygardag klokkan hálvgum tólv verður aftur matiné í Havnar Kirkju.

Hetta er afturvendandi tiltak, har á stuttari konsert býðst høvi at lýða á lættari klassiskan tónleik.

Leygardagin fer Tórshavnar Musikkskúli at framføra, og er tað Guitarbólkurin við solistum, ið fer at vísa síni kynstur.

Guitarbólkurin er mannaður við meira framkomnum næmingum, og hevur sami bólkur m. a. verið á stórari altjóða stevnu í Íslandi í fjør og framført.

Hesaferð fara ymsir solistar eisini at luttaka. Ungi guitarsnillingurin, Brandur Olsen, fer á guitari at framføra kendu guitarkonsertina hjá Antonio Vivaldi.

Harafturat fara Mia Káradóttir á floytu og Andreas Restorff á sello at spæla saman við Guitarbólkinum.

Tónleikurin, ið framførdur verður, er sum áður nevnt, av lættari klassikum slagi. Tónleikur eftir m. a. Vivaldi, Bach og Beethoven er á skránni, og er allur tónleikurin lagdur tilrættis av Ólavi Jakobsen.

Bo Isholm og Ólavur Jakobsen eru leiðarar bólksins.



# Leiðarar í Sjónvarpinum uppsagdir

**Fleiri deildarleiðarar í Sjónvarpinum verða nú sagdir úr starvi. Orsøkin er, at stórar broytingar skulu gerast í bygnaðinum fyri SvF**

SJÓNVARPIÐ
*Eyðun Klakstein*



*Broytingar verða nú gjørdar í Sjónvarpinum, og tað hevur við sær, at fleiri deildarleiðarar missa síni størv*

Sjónvarpsstjórin Mikkjal Helmsdal er nú farin til verka fyri at gera umfatandi broytingar í bygnaðinum fyri Sjónvarp Føroya.

Hetta fær ítøkiligar fylgjur fyri fleiri deildarleiðarar í Sjónvarpinum, sum verða sagdir úr sínum leiðarastørvum frá 1. oktober.

Leiðarar í Sjónvarpinum eru Sámal Samuelsen, Johan Herluf Sørensen, Ivan Niclasen, Ragnar C. Joensen, Carsten Arnskov og Katrin Petersen, sum er virkandi tíðindaleiðari fyri Øssur Winthereig, sum er í farloyvi frá hesum starvi.

Fleiri av hesum leiðarum – ikki allir – verða sagdir úr starvi, tí størvini hjá teimum verða løgd niður í nýggja bygnaðinum, sum skal koma at virka frá 1. oktober.

Starvið sum tíðindaleiðari er eitt av teimum, sum rýkur í nýggja bygnaðinum hjá SvF. – Eg fekk seinnapartin týsdagin at vita, at eg verði sagdur úr starvinum sum tíðindaleiðari, tí hetta starv verður burtur í nýggja bygnaðinum, sigur Øssur Winthereig, sum í løtuni hevur farloyvi frá sínum leiðarastarvi.

Tað bar ikki til at fáa fatur á sjónvarpsstjóranum og fleiri deildarleiðarum fyrrapartin í gjár, tí teir vóru á skeiði.

### Orsøkin

Síðani juni mánað í fjør hevur ein bygnaðarbólkur arbeitt við at gera nýggjan bygnað fyri Sjónvarp Føroya, og hesin bólkur hevur stigvíst arbeitt seg fram til tað úrslit, sum nú skal setast í verk.

Á middegi týsdagin boðaði sjónvarpsstjórin Mentamálaráðnum frá, at hann fer at gera broytingar í Sjónvarpinum.

– Endamálið við nýggja bygnaðinum er at fáa greiðari mannagongdir í sambandi við framleiðslu og dagligar avgerðir í framleiðsluni, greiðari málsetning og máluppfylging í framleiðsluni og eina professionaliersing av SvF sum organisatión, sigur Mikkjal Helmsdal í skrivinum til Mentamálaráðið, sum Sosialurin hevur fingið hendur á.

### Broytingarnar

Umsitingin, savnið og tøknideildin hjá SvF fara at virka óbroytt í nýggja bygnaðinum, meðan tær fýra deildirnar innan framleiðsluna av sendingum – tað eru tíðindadeildin, mentanardeildin, samskiftisdeildin og framleiðsludeildin – verða niðurlagdar, og leiðararnir av hesum deildum verða sagdir úr starvi.

Í staðin fyri hesar fýra deildir koma tvær nýggjar deildir – programm-framleiðsludeildin og skrádeildin.

Programmdeildin skal hava alla framleiðslu av sendingum undir sær, meðan skrádeildin, sum skal verða ein sterk eind, skal taka sær av strategiarbeiði, uppfylgingum og førleikamenning.

Ein leiðari skal setast fyri programmdeildina, og deildin verður skipað við fleiri redaktiónum, sum í tali og innihaldi verða lagaðar til ta strategi, sum Sjónvarpið leggur. Á hvørjari redaktión skulu ein redaktørur og ein framleiðari hava ábyrgdina av sendingunum, sum verða framleiddar.

Mikkjal Helmsdal sigur í skrivnum til Mentamálaráðið, at SvF nú fer undir neyðugu stigini fyri at seta nýggja bygnaðin í verk.

– Í fyrsta lagi verða deildarleiðarastørvini uppsøgd fyri tær deildir, ið verða niðurlagdar, skrivar sjónvarpsstjórin.

Síðani skulu nýggju størvini normerast og lýsast, so at ein hóskandi lønarskipan verður gjørd fyri nýggju deildarleiðarastørvini og fyri komandi redaktørar og framleiðarar.

# Útvarpið tódnar

**Landsstýrismaðurin í mentamálum, Jógvan á Lakjuni, vil ikki ganga umbønini um at hækka útvarpsgjaldið á møti. Gjaldið hækkar einans 100 krónur, og tískil skal ÚF spara 1,4 millión krónur í ár. Tá vit ár eftir ár ikki fáa pengar til lønarvøkstur minkar stovnurin burtur, sigur Jógvan Jespersen, ið spyr, hvat politikararnir vilja við Útvarpinum**

ÚTVARPSGJALD
*Jón Brian Hvidtfeldt*
*jonbrian@sosialurin.fo*



*- Ikki er ráðiligt at hækka ÚF-gjaldið meira enn 100 krónur, sigur Jógvan á Lakjuni. Sostatt má útvarpið spara 1,4 millión í ár*

Eftir drúgva umrøðu hevur Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður í mentamálum, loksins tikið støðu til umbønina frá Útvarpi Føroya um loyvi til at hækka útvarpsgjaldið 200 krónur.

Og greitt er, at Jógvan á Lakjuni gongur ímóti avgerðini hjá undanmanni sínum í Mentamálaráðnum.

Meðan Høgni Hoydal í september í fjør gekk umsøknini frá ÚF á møti, hevur Jógvan á Lakjuni klípt helvtina av hækkingini burtur, so gjaldið einans má hækka 100 krónur.

– Sum búskaparligu vánirnar eru í samfelagnum í løtuni fái eg meg illa til at leggja størri byrðar á fólk við at hækka útvarpsgjaldið. Men tað hevur ligið í kortunum, at útvarpið skuldi fáa fleiri pengar, og tí valdi eg so at hækka gjaldið 100 krónur, sigur Jógvan á Lakjuni.

Løgtingsval varð útskrivað, áðrenn avgerðin um at hækka útvarpsgjaldið 200 krónur varð lýst í kunngerð, og tískil fall málið burtur.

Fyri Útvarp Føroya, ið hevur havt eina munnliga játtan frá landsstýrismanninum at halda seg til, kom avgerðin hjá Jógvan á Lakjuni sera illa við.

– Tað merkir, at vit skulu spara 1,4 millónir krónur í ár, staðfestir Jógvan Jespersen, útvarpsstjóri.

### Skert flog

Sparingin merkir, at yvirtíð verður spard burtur, at færri sendingar verða keyptar frá freelancarum, og at stovnurin ikki tekur ímóti nøkrum journalistpraktikanti í ár.

– Men vit sleppa undan uppsøgnum, sigur Jógvan Jespersen.

Útvarpsstjórin hevur ikki stórvegis hug at gera viðmerkingar til, í hvønn mun sparingin fer at ávirka dygdina á tilfarinum, ið Útvarpið hevur at borðreiða við. Men hann staðfestir, at minni orka verður at taka av.

– Tá vit ikki fáa møguleika at fíggja lønarvøksturin, ið sáttmálarnir áseta, so minkar stovnurin.

– Tí kann ein spyrja, hvat politikararnir vilja við útvarpinum, sigur Jógvan Jespersen.

Útvarpsstjórin eftirlýsir, at politikarar fyrihalda seg til veruleikan, at lønarútreiðslurnar hækka við sáttmálunum á arbeiðsmarknaðinum.

Jógvan á Lakjuni sigur seg skilja sjónarmiðini, men samtíðis heldur hann fast við sítt.

– Politiski veruleikin er, at almennir stovnar fáa ikki kompensatión fyri øktar lønarútreiðslur. Og tá øll onnur í samfelagnum mugu spara, so má útvarpið eisini.

Spurdur, hvat hann sum landsstýrismaður í mentamálum vil við útvarpinum, vísir Jógvan á Lakjuni aftur á búskaparliga veruleikan.

– Sjálvandi ynskja vit ein góðan public service stovn. Og eg rokni við at allir føroyingar halda, at útvarpið hevur sín rætt.

– Men samtíðis havi eg ringa samvitsku av yvirhøvur at hækka útvarpsgjaldið, sum tíðirnar eru, sigur Jógvan á Lakjuni, ið valdi gylta millumvegin millum ynski útvarpsins og einki.

Útvarpsgjaldið kemur í hvørt hús fyrst í apríl mánað, og freistin at gjalda er 1. maj.